# luftina

*Við bert 100 metrar sýni og frosttoku hvørki kunnu – ella skulu! – sjálvt so dugnaligir flogskiparar, sum Hans Meinhard á Høgabóli og Kára Dam, ikki lenda her. Hjá FaroeJet er trygdin altíð í hásætinum!*

Eini hjún hava eitt lítið barn við, men hava óivað ikki valt at taka barnavogn, babylift ella selar við.

Tey vita kortini ráð: Eitt stórt baðihandklæði kann brúkast til annað enn at turka sær við. Stoltu foreldrini, sum helst skulu heim at vísa fram nýfødda barnið til ommur og abbar, brúka stóra handklæðið sum vøggu:

Tey halda í hvør sínum enda av stóra baðihandklæðnum og vagga soleiðis aftur og fram við barninum, sum svevur sín trygga blund. Yvir sær hevur tað eitt annað minni handklæði. Jú, henda øðrvísi vøggan er ikki at forsmáa.

Eini eldri hjún standa álvarslig aftarlaga í køini. Einki bendir á, at tey ótolnast – tey eru tolin av lyndi og mugu bara bíða eftir boðunum um, nær tey sleppa av við viðførið sítt. Hvat eru fimm minuttir, afturímóti tí at sleppa ódýrt og beinleiðis heim?!

### Frosttoka á Balkan

Nú hyggja tey brádliga upp, tí okkurt sær tú til at henda har frammi. Ein maður við brillum sigur okkurt við tey á donskum.

Hann hevur gingið runt og smáprátað við Muusa og okkurt av hinum ferðafólkunum. Á bringuni hevði hann eitt skelti, sum boðaði frá, at hann hevur okkurt við flogferðslu at gera. Og á bláa slipsi hansara sæst eitt gult merki, sum sigur frá at hann umboðar føroyska flogfelagið FaroeJet.

- Jeg må desværre meddele jer alle, at lufthavnen i Pristina er lukket for øjeblikket. Der er frosttåge og dårlig sigtbarhed.

- Så vi må bare vente til klokken 10, før vi får nærmere besked derfra, sigur hesin maðurin, Per at navni.

Heldur ikki Dahina letur seg órógva av hesum boðunum. Hon hevur góða tíð, og fær heldur einki gjørt við veðurforsøgnirnar í heimlandinum.

### Tað ber til

Dahina sjálv kom til Danmark fyri seks árum síðani, nakað eftir herviliga kríggið um Kosovo-landslutin í 90'unum.

Hon var heppin, kom í læru innan heilsuverkið og er í dag í læru innanfyri tannrøktina.

- Tað var ikki altíð so lætt at byrja ta nýggju tilveruna her í Danmark. Men tað nyttar einki bara at siga, at tað ber ikki til.

- Ger ein nakað við tað, so ber tað saktans til, sigur Dahina í óformella prátinum.

Yvir av henni situr ein onnur kosovo-kvinna. Hon kom sum flóttafólk úr Kosovo til Danmarkar, meðan tað leikaði harðast á í heimlandi hennara, og hevur eisini funnið sær arbeiði. Hon starvast innan mótaheimin.

Henni við lið situr ein ungur maður. Hann er komin allan vegin úr einum býi í Noregi, har hann hevur búð í eini 10 ár.

Onnur av hesum kosovo-albanunum koma úr Svøríki. Henda leygarmorgunin eru tey øll undir somu korum: Gleða seg at koma heim til Pristina ella hvar enn í landinum tey búgva.

### Til grannalandið?

Boðini frá umboðsmanninum har frammi við diskin fara so líðandi aftur í køina. Tey verða umsett so hvørt, og um somu tíð duga fólk at skilja, at tey neyvan sleppa av við viðførið við tað fyrsta.

Muusa gongur runt millum fólkið og tosar við tey. Tað er týðiligt at hetta dámar honum ikki. Hansara ætlan var at hesin fyrsti túrurin millum Kastrup og Pristina skuldi ganga eftir ætlan. Kanska veðrið fer at batna út á fyrrapartin, so at sýnið batnar kring flogvøllin í Pristina.

Við bert 100 metrar sýni og frosttoku hvørki kunnu – ella skulu! – sjálvt so dugnaligir flogskiparar sum Hans Meinhard á Høgabóli og Kára Dam, ikki lenda her. Hjá FaroeJet er trygdin altíð í hásætinum!

Hann greiðir ferðafólkunum frá, at veðurmenninir hava boðað frá, at tað fer at lætta í kl. 9 um morgunin. Fær sólin hitað luft og jørð eitt sindur, fer tokan at hvørva og klárt verður at lenda her.

Ein maður kemur fram til hansara. Hann hevur ein spurning: - Um tað fer at bera til at lenda í makedónska høvuðsstaðnum, Skopje í staðin? Tað hevði onkur nevnt sum ein møguleika.

Orðið "Skopje" fer sum rótasúpan gjøgnum køina av ferðafólkum. Hetta er ikki nakað sum teimum dámar serliga væl. Skal hesin møguleikin roynast, er neyðugt at teimum verður útvegað eitt sonevnt transitt-pass, og tað kann taka sína tíð! Hetta er vist ikki nakað sum fólkinum dámar væl!

Diskurin at tjekka viðførið inn letur nú upp. Tvey fólk sita innanfyri og vinarliga avgreiða tey ferðaseðlar og viðførið hjá spentu og hugagóðu kosovo-albanunum. Nærri boð verða givin seinni um sjálva fráferðina.

### Sólin hægst á himmalin

Klokkan er nú farin at nærkast 9 og á stórskíggjanum verður nú boðað frá, at ætlaða flogferðin til Pristina skal verða kl. 10.

Tíð er at finna sær útgongdina og gera seg klár-an til hesa fyrstu flogferðina hjá FaroeJet til Kosovo.

Í erva sita fleiri av ferðafólkunum og bíða. Tey hava sett seg soleiðis, at tey einfalt kunnu síggja stórskíggjan. – Bara vit skjótt fáa okkurt at vita. Við sjálva útgongdina sita eisini fleiri fólk.

Umboðsmenninir báðir – altso Muusa og Per – práta saman og nógv í telefon hesa løtuna. Tað er týðiligt, at nú má skjótt takast ein avgerð: Verður farið avstað nú, er sólin komin hægst á himmalin um tað mundið, tá F6 skal lenda í Pristina. Tá er størstu sannlíkindi fyri, at frosttokan er burtur.

### Ein lagna og onnur

Ferðafólkini práta sínámillum. Tey lata seg ikki ávirka av spentu støðuni.



*Hvørki Per, Dahina ella nakar annar kundu gera nakað við veðrið í Pristina – ella við fíggjarligu støðuna hjá føroyska flogfelagnum FaroeJet*

- Åhnei, letur í einum teirra. – Hyggið at skíggjanum! Eingin flogferð verður í dag. Ikki fyrrenn í morgin kl. 7:30. Hvar fór Muusa?

Muusa hevur eisini fingið nýggjastu boðini um útsettu fráferðina. Hvat skal hann nú gera? Ringja til hotell í býnum og veita teimum ferðandi innivist til ímorgin. Tað fer at kosta honum nógvan pening!

Tað sum hvørki Muusa, Per, Dahina, hini ferðafólkini ella nakar annar visti júst tá var, at lagnan hjá FaroeJet var avgjørd í somu løtu.

Høgir harrar høvdu alla náttina sitið á fundi fyri at finna loysn fyri framtíðina hjá flogfelagnum.

### Flóttafólk – aftur!

Dúgliga varð fundast heima í Føroyum. Men staðfestast kundi kortini:

Henda loysnin varð ikki funnin. Tí er felagið farið av knóranum. Og tí verður eingin flúgving aftur hjá felagnum.

Eftir sita 70 kosovo-albanar ørg, spyrjandi og vónbrotin, alt ísenn.

Uttan at biðja um tað – ella ynskja tað – gjørdust tey offur fyri eini kapping um ferðafólkini á Føroya-rutuni.

Í roynd og veru gjørdust tey enn einaferð flóttafólk, hesa ferð á einum altjóða flogvølli í Danmark!

Spurnarteknið kundi týðiliga lesast í eygunum á ungu Dahinu:

- Hvussu nú – sleppi eg yvirhøvur heim til Kosovo á jólum?!

## SEINASTA:

### *Sluppu heim*

**Hóast teir 70 kosovo-albanarnir ikki sluppu heim leygarmorgunin, sluppu teir kortini seinnapartin í gjár.**

**Atlantsflog tók nevniliga eisini yvir avtaluna við Mega Turist. Á henda hátt varð flogið til Pristina sunnudagin.**